


## SHERLOCK HOLMES GONGUR AFTUR

Vanliga verður onkur stórfilmur frumsýndur í biografum annan jóladag, og í ár er tað stórfilmurin hjá Guy Ritchie um Sherlock Holmes. Óteljandi filmar og sjónvarpsfilmar eru gjørdir um Sherlock Holmes, og hesaferð er tað Robert Downey Jr., sum tulkar enskar meistaradetektivin.

**SHERLOCK HOLMES**
Havnar Bio
annan jóladag 26/12



## MIDNÁTTARMESSA

Á midnátt jólaaftan er tiltikna midnáttarmessan í Pæturskirkjuni í Rom. Katolikkarnir hava sína stóru løtu, sum eisini verður sjónvarpað í mongum londum kring heimin. Midnáttarmessan røkkur eisini til Føroya, og tíbetur plagar prædikkan hjá pávanum at verða týdd – um ikki annað til danskt.

**MIDNÁTTARMESSA ÚR PÆTURSKIRKJUNI**
Sjónvarpið jólaaftan 24/11 kl. 22.55



## EG ERI OZZY

Hann er rockstjørnan, sum eingin annar kann samanlíknast við. Tað finst bert ein Ozzy Osbourne – tíbetur. Sum sangari í rockbólkinum Black Sabbath var hann tiltikin, men eisini sum solistur hevur hann verið millum tey stóru. Hann var misbrúkari av rúsevnum, og kærleikin til og frá konunu Sharon og teirra børn bjargaði honum at enda. Hetta er søgan hjá Prince of Darkness – søgd við hansara egnu orðum.

**OZZY OSBOURNE**
I Am Ozzy
Sphere



## HVUSSU HITTUST LØKKE OG SÓLRUN?

Politiski viðmerkjarin Niels Krause-Kjær hevur skrivað eina portrettbók um Lars Løkke Rasmussen. Hetta er ein bók, sum serliga tulkar politisku yrkisleiðina hjá Lars Løkke, men nortið verður eisini við privat viðurskifti hjá føroyska forsætisráðharranum. Millum annað verður sagt frá, hvussu Løkke og føroyska Sólrun hittust, og hví eitt telefonkall frá Sólrun til Løkke, sum varð staddur í Norðurkorea, fekk so stóran týdning fyri tey.

**NIELS KRAUSE-KJÆR**
Lars Løkke
JP Forlag



## JÓLAKONSERT

Klaksvíkar Hornorkestur skipar á hvørjum ári fyri jólakonsert í Christianskirkjuni, og í ár varð Útvarpið við og bandaði konsertina. Á konsertini spælir Klaksvíkar Hornorkestur, men solistar sum Hallur Joensen, Kristina Bærendsen, Rani Nolsøe og Ingibjørg Hansen luttaka eisini á konsertini.

**JÓLAKONSERT Í CHRISTIANSKIRKJUNI**
Útvarpið
fyrsta jóladag 25/11 kl. 16.45



## RØTT UPPHITING

Tað er kalt, tað er kavi, tað er jólaligt, og tað er hugnaligt. Klassiska Disney jólashowið hevur alt tað, sum upphitingin til stóru løtuna jólaaftan skal hava. Dunnaldur er í øðini og bjóðar Rip, Rap og Rup av í kavakríggi. Mickey Mouse fær trupulleikar av jólatrænum og so víðari. Hendan Disney løtan er av teimum heilt stóru.

**DISNEY JÓLASHOW**
Sjónvarpið jólaaftan 24/11 kl. 17.00



## BOXING DAY FÓTBÓLTUR

Annar jóladagur er traditionelt stóri fótbóltsdagurin í Onglandi. Tá fer maður av húsum at hyggja eftir fótbólti, og hóast fleiri av stóru feløgunum hesi jólini spæla triðja jóladag, sum er sunnudagur, so eru fleiri spennandi dystir á skránni Boxing Day. Ein av teimum er dysturin millum Sunderland og Everton, sum uttan iva verður lívligur.

**SUNDERLAND-EVERTON**
Premier League
Annan jóladag 26/12 kl. 15.00